### Minningarorð um

# Erling Bech í Porkeri



Tað er nú ein mánaði síðan, at boðini komu norð um fjørð, at Erling hevði fingið loyvi at reisa heim til staðin við teimum føstu grundvøllunum, har Jesus er einasti Harri og Gud.

Tað var í 1973, at eg kom at kenna Erling. Stutta tíð eftir at »Halleluja-rópið« var føtt í hansara anda og hjarta. Tað var meira enn bert tóm orð. Tað livdi hann í, og tað var hansara vitnisburður, lívið í Jesusi, hinum salvaða. Ikki hevði man tosað við Erling í langa tíð, fyrr enn frelsugleðin hoyrdist í tónum hansara. Eisini virðingin fyri orði Guds og øllum, ið heilagt er, livdi hann í. Eisini minnist eg tey sterku møtini við radikalum talarum, hvar í húsini vóru stappfull av fólki, ið søktu Jesus og hansara frelsu. Alt hetta var Erling ein av lyklamonnunum til. Samkoman »Sion« varð fødd, og hetta fría fólkið stóð uttanfyri øll religiøs tilhald og prísaðu Honum, ið hevur lovað at vera við allar dagar, og Gud møtti fólki sínum.

Sjúkralegan hjá Erling gjørdist ikki drúgv, sum gott var. Ræðuligt hevði tað verið at sæð hendan aktiva mann, ið elskaði lívið, siti í rullustóli ella tað, ið verri var.

At Erling var kendur, sást á tí stóra skara, ið fylgdu honum til síðsta hvíldarpláss her.

Og sum Guds orð sigur: »Hvør lastar hann fyri atburð hansara!... Til gravar verður hann borðin við heiður, og vakt verður hildin yvir gravheygnum. Søt er hvíla hansara í dalsmoldini, og allur heimurin fylgir so eftir, eins og óteljandi flokkur gekk undan honum«. Ein verður dagurin, tá øll aftur skulu møtast aftur í skýggjum himmalsins - ikki fleiri og ikki færri, men øll, sum eru sovnaði í Kristusi.

Jessy, tú og øll tit hava mist mann og pápa, abba og verfaðir, ið elskaði tykkum. Ærað verið minnið um Erling.

**Petur Sørensen**

*Jeg kjenner en sum vandret har i verden.*
*Hann eide ikke jordisk gods og gull.*
*Hann bar en større rikdom under ferden;*
*en frelsesgave skjønn og underfull.*

*Som kildens klare vann fra Klippen*
*flyter veller livets strøm så ren og fin.*
*Og i sitt ord hann dekker bord,*
*men fete retter og med klaret vin.*

*Jeg ble så grepet at jeg vandret etter,*
*men merket straks at venner meg forlot.*
*Av mange ande ble jeg dømt som kjetter*
*og mange anstøt la de for min fot.*

*Nu har jeg sett ham selv og hørt hans stemme.*
*hann hvisket disse underfulle ord:*
*Her er korset, kronen venter hjemme.*
*Din tåresød blir høstens jubelkor.*

†

Okkara høgt elskaða dóttir og systir

**Bryndis Unadóttir**

andaðist í heiminum sunnudagin, 14 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhanna, Uni og Pætur**

**Silvurbrúdleyp**

Mikudagin 25. februar hava hjúnini Annvør Karbech og Jóhan Petur Niclassen silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Dagurin**
**24. februar. Leypársmessa.** Fjórða hvørt ár varð ein dagur taldur afturat í februar mánaði, so at hann fekk 29 dagar. Hetta var ein fyriskipan í tíðarrokning okkara, sum skuldi fáa ár og dagar at samsvara við gongd sólarinnar. Hann var vanliga hildin 24. februar, men 25. februar, tá ið leypár var. Niels Winther doyði hendan dagin í 1892.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Kreativar grýlur



Í gjár var fastalávintsmánadagur og grýlurnar vóru nógvar kring landið. Her eru tríggjar kreativar grýlur í Vestmanna.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Páll Poulsen á Eiði** fer til gravar úr Mizpa á Eiði týsdagin kl. 14.

**Ingvør Andreasen, fødd Nolsøe, Tvøroyri**, andaðist leygardagin, 76 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju mikudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Bryndis Unadóttir** andaðist í heiminum sunnudagin 22. februar, 14 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Karolina Hansen, ættað úr Uldum, búsitandi í Klaksvík** fer til gravar úr Christianskirkjuni mikudagin kl. 13. Tey, ið ynska at senda blómur ella krans kunnu í staðin lata eina peningagávu á konto í Norðoya Sparikassa.

**Herborg Thomsen**, fyrrverandi ljósmóður, Miðvági, andaðist sunnudagin, 89 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni




Skeið 27. apríl 2009

## Eygleiðing og skrivlig frásøgn

**Skeiðið** er býtt upp í tveir partar, sum tó hava knýti til hvønnannan.

**Fyrrapartin** verður hugt at viðurskiftum, sum kunnu hava avgerandi týdning, tá vit skulu skilja atburðin hjá børnum. Skeiðluttakararnir fáa m.a. innlit í eitt konkret arbeiðsamboð, "mestringscirkelen". Hetta amboðið kann brúkast sum ein hjálp til at vísa á, hvar styrkirnar hjá barninum liggja, og hvar tørvur er á meira stuðli.

**Seinnapartin** verður fokus lagt á ta skrivligu orðingina av eygleiðingunum, hvussu vit systematisera tilfarið, og hvussu vit á bestan hátt formidla boðskapin, soleiðis at bæði umsitingin og foreldrini eru før fyri at móttaka og skilja tað, tú skrivar rætt. Eisini uttan at hetta skal taka óneyðuga langa tíð og orku hjá tær.

**Nær:** 27. Apríl 2009, kl. 08.30 - 16.00 **Hvar:** Tórshavn **Kostnaður:** 2.560 kr. u/mvg (kr. 3.200 v/mvg) **Freist:** 6. apríl ella so leingi pláss eru.

Les meira og tekna teg á www.synergi.fo

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn - www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - tel. 32BELL (322355)